# Óli Holm einsamalt formansvalevni í FSF

**Í gjár var kunngjørt, at Frithleif Olsen tók seg aftur sum formansvalevni hjá FSF, og hetta merkir, at nú er Óli Holm í Vági einsamalt formansvalevni til aðalfundin, sum verður komandi leygardag**



*Óli Holm úr Vági er nú einasta valevni til formanssessin hjá Fótbóltssambandi Føroya*
*savnsmynd*

FSF
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tá ið aðalfundurin hjá Fótbóltssambandi Føroya var fyrst í síðsta mánaða, var nógv umrødda formansvalið útsett til ein nýggjan fund, ið verður nú komandi leygardag. Til aðalfundin var bert tað eina valevni, Frithleif Olsen, og hetta mettu fleiri feløg verða óheppið.

Frithleif Olsen hevur valt at taka seg aftur sum formansvalevni, eftir at hann júst er valdur til formann í nevndini fyri Føroya Sparikassa, og tískil ikki metti seg føran at røkja báðar formanssessirnar.

### Sama støða

Formansvalið á aðalfundinum í februar bleiv útsett, tí fleiri feløg mettu tað verða óheppið, at eitt annað valevni, núverandi formaður Dánjal Andreasen, trekti seg, eftir at freistin var úti fyri at koma við valevnisuppskotum. Óli Holm stillaði ikki upp til formanssessin tá, og feløgini vildu fegin hava møguleikan at velja millum í minsta lagi tvey valevnir. Tískil setti VB fram uppskot um, at formansvalið var útsett, og hetta var samtykt.

Nú er FSF komið í somu støðu við tað, at eitt valevni hevur trekt seg, eftir at freistin fyri at skjóta upp valevnir er úti, og tískil er aftur hesaferð bert tað eina valevni til formanssessin, nevnliga Óli Holm.

Formaðurin í VB, Johan Hendrik Holm, ið legði uppskotið um útsetan av formansvalið fram á aðalfundinum í februar, sigur seg ikki hava nakra viðmerking til støðuna, sum nú er, tí at hann er sonur formansvalevni, Óla Holm, og tískil vil spurnartekin altíð verða sett við støðuna hjá VB í løtuni.

Eitt av feløgunum, ið skeyt Frithleif Olsen upp sum formansvalevni, er B68, og Niclas Davidsen formaður í B68, heldur tað verða harmiligt, at Frithleif Olsen hevur trekt seg, men felagið hevur enn ikki viðgjørt støðuna, men tað verður væntandi gjørt á innanhýsis fundi íkvøld. Niclas Davidsen sigur, at tað er ein óheppin støða, sum nú er komin í, men at feløgini fáa ikki gjørt nakað við tað, tí nú er ov seint at koma við onkrum nýggjum valevni. Hann væntar eisini, at tey einstøku feløgini fara viðgerða málið innanhýsis í hesi vikuni, og helst fara onkur feløg eisini at tosa saman undan aðalfundinum leygardagin.

### Óli allarhelst formaður

Á fundin leygardagin verður Óli Holm allarhelst valdur til nýggjan formann í FSF. Tó ber til at útseta valið enn einaferð, men í løtuni er ikki nógv, ið bendir á tað, tí tað tykist sum um, at Óli Holm er ein maður, ið hevur hollan stuðul millum feløgini.

Óli Holm hevur verið virkin innan FSF í mong ár, og hann hevur sitið í starvsnevndini í drúgt tíðarskeið. Verður Óli Holm valdur til formann, verður hann fyrsti suðuroyingurin, ið situr í sessinum.

Nógv rumbul hevur verið um formansstríðið í FSF, og fráfarandi formaðurin, Dánjal Andreasen, stóð serliga fyri skotum, og tað endaði so við, at hann valdi at leggja kongin og taka seg aftur sum valevni. Ein meiriluti i starvsnevndini hjá FSF skeyt Rúna Heinesen upp sum formansvalevni, men hann valdi at taka seg aftur, eftir at fleiri feløg høvdu víst sína misnøgd við framferðina hjá meirilutanum í starvsnevndini.



*Frithleif Olsen valdi at taka seg aftur sum formansvalevni, eftir at hann herfyri bleiv valdur til nevndarformann í Føroya Sparikassa*
*savnsmynd*

## Dani royndarvenur í HB

Í farnu viku kom danin, Nick Jensen, til Føroya at vitja í eina viku. Nick Jensen er vinmaður danska miðvallaleikaran hjá HB, Martin Christensen, og hann hevur bjóðað seg fram til havnarfelagið sum leikara.

Í vikuskiftinum leikti Nick Jensen við á HB-liðnum, sum spældi javnt 0-0 móti B68 í Klaksvíkskappingini, og tá leikti hann á høgra bakki. Í dystinum sunnudagin móti B36, var Nick Jensen eykamaður, og hann kom ikki á vøllin, áðrenn dysturin var blástur av. Birgir Enghamar, formaður í HB, sigur, at talan er um ein leikara, ið sjálvur hevur bjóðað seg fram til HB, men at felagið enn ikki hevur tikið støðu til, um Nick Jensen fær bjóðað sáttmála við HB. Formaðurin í HB sigur, at hópurin er breiður í løtuni, og tí skal talan verða um ein munandi styrk, áðrenn vit fara at bjóða honum sáttmála. Nick Jensen hevur áður leikt við danska felagnum Kalundborg í næstfremstu donsku deildini.

**tn**






## Góðir brúktir bilar

| | |
|---|---|
| **Nissan Almera 2.0 Diesel GX** reyður, árg 1996, 4 hurðar, km 90.000 **72.000** | **Opel Astra 2.0 Di Sedan** vínreyður, árg 2000, 4 hurðar, km. 97.000 **115.000** |
| **Nissan Primera 1.6 Player** svartur, árg 1995, 4 hurðar, km 139.000 **67.000** | **Opel Vectra 2.0 DT Station Car** svartur, árg 1997, 5 hurðar, km. 182.000 **95.000** |
| **Peugeot 306 XR 1.4** reyður, árg 1999, 5 hurðar, km 40.000 **95.000** | **Saab 9-3 2.2 TiD** bláur, árg 2001, 5 hurðar, km 74.000 **195.000** |
| **Peugeot 306 XR 1.4** reyður, árg 1999, 5 hurðar **89.000** | **Honda Accord 2.0** gráur, árg 1999, 4 hurðar, km. 96.000 **155.000** |
| **Peugeot 306 DieselTurbo1.9** gráur, árg 1995, 4 hurðar, km. 205.000 **46.000** | **Toyota Carina E 1.8 XLi** gráur, árg 1996, 4 hurðar, km. 144.000 sýnaður jan 2004 **68.000** |
| **Peugeot 405 1.6 GR** bláur, árg. 1989, 4 hurðar **27.000** | **Toyota Avensis 1.8 Sol** bláur, árg 2001, 4 hurðar, km. 48.000 **178.000** |
| **Peugeot 406 1.8** grønur, árg. 1997, 4 hurðar, km. 129.000 **99.000** | **Citroen Xantia 1.9 TD** bláur, árg 1997, 5 hurðar. km. 184.000 **75.000** |
| **Peugeot 406 ST 2.0 Hdi v/aircon** vínreyður, árg. 1999, 4 hurðar, km. 120.000, fyrr 145.000 **nú 135.000** | **Citroen Xantia 2.0 Hdi, Station Car** grønur, árg 2000, km. 110.000 **148.000** |
| **Peugeot Expert Combi 2.0 Hdi, 110 HK, 8 sitipláss** bláur, árg. 2003, 4 hurðar, km. 19.000 **259.000** | **Ford Escort 1.8** bláur, árg 1995, 4 hurðar, km. 101.000 **59.000** |
| **Peugeot 406 ST 2.0** gráur, árg 1999, 4 hurðar, km. 63.000 **130.000** | **Ford Fiesta** svatur, 3 hurðar **7.000** |
| **Opel Agila 1.2** grønur, árg 2001, 5 hurðar, km. 36.000, fyrr 110.000,- **nú 95.000** | **Hyundai Accent 1.5 AirCon** gráur, árg 2000, 5 hurðar, km. 92.000 **89.000** |
| **Opel Corsa 1.4 Swing** grønur, árg 1997, 5 hurðar, km. 84.000 **68.000** | **Suzuki Baleno 1.3** bláur, árg 1997, 4 hurðar km. 74.000, sýnaður sep 2003 **57.000** |
| **Opel Corsa 1.4 Swing** grønur, árg 1999, 5 hurðar, km. 62.000 **79.000** | **Fiat Cinquecento 1.1** gulur, árg 1995, 3 hurðar **38.000** |
| **Opel Astra 1.6 16V** hvítur, árg 1996, 4 hurðar, km. 119.000 **64.000** | **Fiat Marea 1.9 DT Station Car** ljósabláur, árg 1997, 5 hurðar, km. 135.000 **78.000** |

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Fyrispurningar kunnu vera settir á telefon 34 54 00,
eisini ber til at senda teldupost til: nissan@nissan.fo
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

Sosialurin 341800

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

NUNA ADVOKATER

## Advokatur til Nuna Law

Nuna Law hevur havt skrivstovu í Nuuk í Grønlandi í meira enn 30 ár. Skrivstovan er mannað við 4 advokatum, sum allir búgva í Nuuk.

Nuna Law er deild hjá Dania Advokater A/S, sum hevur skrivstovur í Keypmannahavn, Svendborg, Tórshavn og Moskva.

Høvuðsstarvsøkið hjá Nuna Law er, eins og hjá Dania Advokatum, vinnuráðgeving. Men Nuna Law tekur sær eisini av øðrum starvsøkjum, eitt nú almennum rætti, uppsagnarrætti og revsirætti. Skrivstovan tekur sær eisini av at føra rættarmál.

Ynskir tú at vita meira um Nuna Law ber til at fara inn á heimasíðuna www.nuna-law.gl.

**Vit søkja** eftir einum advokati, sum hevur í minsta lagi 2-3 ára advokatroyndir, at byrja umleið 1. august 2004.

Tað hevur stóran týdning fyri okkum, at tú dugir væl at samskifta út eftir, men eisini innanhýsis, og at tú hevur framúr góðan fakligan førleika til at veita vinnuliga ráðgeving á høgum støði og í einari knappari vending evnar at seta teg inn í nýggj starvsøkir. Tú skalt tíma at arbeiða við fjøltáttaðum uppgávum. Royndir at føra rættarmál geva fyrimun.

Tú skalt rokna við at skula búseta teg í Grønlandi í minst 3 ár og helst í eitt longri tíðarskeið.

**Vit bjóða** eitt sera spennandi og avbjóðandi starv, sum tú í rættiliga stóran mun sjálv(ur) fær møguleika fyri at skapa. Vit bjóða harafturat góð lønar- og setanarkor eftir nærri avtalu við teg.

Ynskir tú at vita meira um starvið, kans tú seta teg í samband við Eyðfinnur Jacobsen, advokat, hjá Faroe Law á telefon 35 99 00 ella Peter Schriver, advokat, hjá Nuna Law á telefon 00 299 32 13 70.

Umsóknarfreistin er týsdagin 30. mars 2004.

Umsókn saman við prógvum og viðmælum skulu sendast til Nuna Law, Postboks 59, 3900 Nuuk, att: advokat Peter Schriver.

MÓTTØKA

Hotel Vágar 25 ár
Flogfelag Føroya 40 ár

Í hesum sambandi bjóða vit viðskiftafólki, samstarvsfeløgum og vinfólki, at verða vælkomin inn á gólvið á Hotel Vágum fríggjadagin 19. mars millum kl. 15.-18.

Samstundis takka vit fyrrnevndu fyri gott samskifti, við framhaldandi ynski um gott samstarv.

Ein stór tøkk til okkara starvsfólkalið, sum manna felagið.

Sosialurin 341800

FLOGFELAG FØROYA

## Lastbilur til sølu

MAN 8-150, 8 Tons total, 150 HK 6syl, árg. 1990, ikki vippulast, nýsýnaður, í góðum standi. Selist vegna broytt virksemi, broyttan tørv.

Kr. 50.000,-

**LYFTA**
Eyðun Egholm
Tel 50 31 50 · lyfta@kallnet.fo

## Býráðsfundurin fluttur

Býráðsfundurin, ið lýstur er at verða 25. mars, verður ístaðin mikudagin 24. mars 2004 kl. 16.00.




**Runavíkar kommuna**

Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
i

Sosialurin
– hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00
fax 34 18 01

heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo

**Frá Klaksvíkar Útróðrarfelag**

## Ársaðalfundur

verður á Klaksvíkar Sjómansheimi
sunnudagin 21. mars. kl. 13.30.

Skrá sambært lógum felagsins.